## Ársins sangari:

# Útgávuætlanir í 2011

Fyrst í 2010 var hann við í danska Grand Prixnum við lagnum Gloria. Fyriuttan tað gjørdi Jens Marni Hansen ikki serliga nógv um seg. Men tann eini sangurin var nóg mikið at fáa hann tilnevndan til tvær planetir og vinna honum heiðurin sum ársins sangara

- Tað er eitt yvirraskilisi yvirhøvur at vera tilnevndur. Eg hugsaði, at eg hevði ikki gjørt so nógv í ár. Men tónleikur er so nógv ymiskt, tað er ikki sum ítróttur, har ein er greiður vinnari. Tað blívi eg við at siga. So tað er altíð eitt yvirraskilsi at kunna vinna í tónleikinum.

- Tí teir, sum vóru tilnevndir saman við mær eru bestemt góðir sangarar, og eg eri bara glaður fyria at tað var eg , sum varð valdur hesuferð.

- Hetta er ein staðfesting av, at tað er onkur sum dámar tað, man ger, so tað er deiligt.

Jens Marni er sannførdur um, at tað ikki er tilvild, sum hevur fingið hann so langt í tónleikinum.
- Tað liggja nógv ár aftanfyri. Harumframt ger man kanska tónleik, sum er til tað stóru fjøldina. Og eg havi eisini tey røttu fólkini rundanum meg, sum hjálpa mær, slær hann fast.

### Nýggj fløga í 2011

Ætlanin fyri 2011 er at gera eina nýggja fløgu. Eg vóni, at vit klára tað í 2011. Tað eru framvegis nógv ting, sum skulu fáast uppá pláss, bæði viðvíkjandi sangum og økonomi.

Tá hann verður spurdur, um hann so fer at verða ársins sangari og vinna planetina fyri ársins fløgu í 2011, flennir Jens Marni.

- Lat okkum nú fyrst fáa gjørt løgini og produserað fløguna, og so taka vit tað harfrá.

eydna@sosialurin.fo



*Jens Marni, sum fyrr í ár var við í danska grand prixnum, framførdi rocklagið Gloria. Jens Marni var tilnevndur til tvær planetir og vann heiðurin at vera ársins sangari*



*Eiðisdaman Anna Katrin Egilstrøð er ársins songkvinna*

## Ársins songkvinna:

# Anna Katrin fer solo

**Hon er serliga kend sum mystiska songkvinnan í altjóða bólkinum Valravn. Men komandi hálva árið fer hon at arbeiða einsamøll við eini soloútgávu**

Eydna Skaale

- Eg eri ræðuliga yvirraskað, eg eri stolt, eg sigi takk! var fyrsta reaktiónin, tá vit fingu fatur á Onnu Katrin Egilstrøð beint eftir handanina.

Tað tók eina góða løtu áðrenn ársins songkvinna kom upp á pallin eftir planetini.

- Eg hevði seriøst slett ikki væntað hetta, og eg helt, at tað bara var familjan hjá mær, sum atkvøddi fyri mær, segði hon smílandi. Hon var tí í niðaru hæddini, tá handanin fór fram.

- Eg eri ræðuliga yvirraskað, eg veit slett ikki ordiliga hvussu eg havi tað, sigur hon.

### Fer solo

Anna Katrin er serliga kend fyri at vera sangarinna í tjóðarblandaða bólkinum Valravn. Tey hava fingið framúr góð ummæli bæði her heima og í Danmark.

Tá hon verður spurd um komandi árið, letur hon ongan iva vera um, at hon hevur onkrar ætlanir. Hon vil tó ikki avdúka alt ov nógv.

- Eg eri júst farin í gongd við eitt nýtt prosjekt, sum eitur Akat, og tað fari eg at arbeiða seriøst við komandi hálva árið, og gera eina fløgu við Akat

### Frá sjónleiki til tónleik

Anna Katrin Egilstrøð fór til Danmarkar sum sjónleikari, men tað var skjótt, at hon skifti til tónleikin.

-Tú ert meiri nakin og sárbar, tá tú ert tónleikari, og tí var tað meiri avbjóðandi fyri meg. Og eg gjørdist sera áhugað í at læra meiri um tónleikin.

Hóast Valravn er ein brakandi sucess, sum hevur spælt konsertir kring um í heiminum, m.a. hava tey júst verið í Japan, so er Anna Katrin framvegis ein bygdaslig genta av Eiði. - Eg eri eitt náttúrubarn, og um eg ikki ferðaðist so nógv, so hevði eg ikki búð í Danmark.

- Næsta ár eg vóni eg at koma runt ymsa staðni í heiminum. Eg vóni at vera meiri í Føroyum, men heimurin er stórur, og eg ætli mær at koma longur út enn bara Danmark, slær hon fast.

eydna@sosialurin.fo